Tíðindaskriv um fundin hjá Málfelagnum týskvøldið 29.9.15 kl 20 í Miðlahúsinum í sambandi við útgávuna av móðurmálsalfabetinum

Væl av fólkið varð møtt. Fundurin byrjaði við at Regin Eikhólm, orðstýrari, bjóðaði vælkomin og greiddi frá skránni. Síðani hevði **Dan Reinert Petersen**, formaður í Málfelagnum, eina søguliga gjøgnumgongd av virkseminum hjá Málfelagnum, sum André Niclasen, sáli, legði lunnar undir.

Vit í felagnum frøddust, segði hann, tá Málráðið í 2013 eftir áheitan frá Mentanarnevndini í Løgtinginum varð stovnað, og sum við sínum 11 limum, breitt skuldi umboða tær ymisku máláskoðanirnar. Men skjótt skuldi tað vísa seg, at Málráðið ikki livdi upp til málsetningin, og at meirilutin uttan debatt skerdi alfabetið við fimm bókstavum. Hetta stendur í andsøgn til, at Bjørn Kallsø, táverandi mentamálaráðharri, í setanarrøðuni (08.01.13) mælti til, at Málráðið skuldi arbeiða so, at øll skuldu kenna seg aftur í málinum, og at Málráðið skuldi arbeiða við at fremja tað latínska alfabetið.

Jógvan í Lon Jacobsen: Hví mælti fyrrverandi málnevndintil tað óskerda, latínska stavraðið?

Síðani hevði Jógvan í Lon Jacobsen, málfrøðingur, eina framløgu, har hann staðfesti, at spurningurin um stavraðið ikki var ein málfrøðiligur spurningur, men at talan er um eitt pedagogiskt og praktiskt amboð í tí dagliga, har tað er neyðugt at kenna raðfylgjuna í tí latínska alfabetinum, t.d. tá tú skalt sláa upp í eini telefonbók, leita í einum skjalasavni v.m. Hjá summum er stavraðið gjørt til eitt hugsjónarligt stríð, har stavraðið er blivið til eina tjóðskaparliga ímynd ella ikon uttan atlit til tað áðurnevnda pragmatiska og praktiska nyttuvirðið, ið eitt stavrað eigur at hava. Jógvan í Lon førdi eisini fram, at eitt stavrað ikki stendur oman fyri navnalógina, tískil kunnu foreldur ikki argumentera fyri stavseting av nøvnum út frá stavraðnum, tí her tekur navnanevndin støðu. Meirilutin í Málráðnum umboðar eina ávísa tjóðskaparliga hugsjón, sum hevur gjørt tað neyðugt við tveimum stavraðum: einum almennum ekskluderandi skerdum stavraði og einum óskerdum inkluderandi stavraði, tí fólk vóru ósamd um at gera tillagingar. Hann mælir til eitt inkluderandi stavrað heldur enn tvey, tí vit vera ikki verri føroyingar av tí. Til síðst nevndi hann eina kanning, sum varð gjørd til eina uppgávu á Fróðskaparsetrinum í 2014, har 72,1% av teimum spurdu søgdu ja til eitt inkluderandi stavrað t.v.s. tað vanliga latínska alfabetið.

Eivind Weyhe: Hví mælti minnilutin í Málráðnum til tað óskerda alfabetið?

Eivind Weyhe, málfrøðingur, vísti sum limur í Málráðnum til tilmælið hjá minnilutanum í Málráðnum (sum stendur á baksíðuni av móðurmálsalfabetinum), har tey mæla til at varðveita c, q, w, x og z í alfabetinum, mótvegis meirilutanum, sum valdi at ekskludera hesar bókstavirnar. Hann vísti á, at eitt alfabet ikki er nøkur natúrlóg, men ein praktiskur listi við teimum bókstavum, sum vit brúka, eitt nú nevndi hann c-vitamin, c-moll, celsius, CO2, cm, watt, Marxisma og sex. Og tað sama er galdandi fyri z og q. Fyri vanlig tøkuorð verður tað upp til eina rættskrivingarorðabók at vísa á, nær vit brúka hvat. Eivind Weyhe vísti eisini til at Føroyska Orðabókin, vanliga nevnd Móðurmálsorðabókin, hevur c, q,w, x og z við, og tískil góðtekur hon bókstavirnar. Tí er tað óskiljandi, at teir ikki skulu vera við í alfabetinum. Og hann endaði við spurninginum, hví føroysk skúlabørn ikki skulu læra, hvar c, q, w, x og z skulu standa?

Jógvan Mørkøre: Ekskluderaðu bókstavirnir í sambandi við Atlassið og ST-tilmælini.

Triðju framløguna hevði Jógvan Mørkøre, geografur og stjórnmálafrøðingur. Hann førdi fram, at alfabetið í sambandi við atlassið, sum NÁM gav út í 2014, er eitt úttrykk fyri tað, sum er komið at eita tjóðarbygging. Nakað, sum ein skuldi hildið, allir føroyingar skuldu kunnað staðið saman um, men tíverri hevur tað skapt eitt satt borgarakríggj, soleiðis sum tað er praktiserað. Í atlassinum standa landanøvn skrivað uttan ekskluderaðu bókstavirnar, meðan býarnøvn kunnu verða skrivað við hesum bókstavum. Jógvan Mørkøre vísti á, at tað ikki er rætt at gera seg inn á staðarnøvn hjá øðrum í skúlahøpi. Hetta er at vísa manglandi respekt. Viðvíkjandi yrkismálinum í atlassinum, so er føroyski ungdómurin illa farin, tá ið hann skal undir víðari lestur uttanlands, tí føroysku frøðiorðini eru so ólík teimum vanligu fakorðunum, tey brúka stórt sæð alla aðrastaðni. Jógvan Mørkøre vísti eisini á, at realpolitiska loysingin er skift út við symbolpolitiska tjóðarbygging, og at orðið loysing í dag hjá loysingarvonginum í føroyskum politikki er útvatnað til tað týdningarleysa. Og tað er harmiligt, helt Jógvan Mørkøre, tí tað hevur inniborið, at symbolpolitikkur sum uttanumtos er sloppin at bróta meira niður, enn tað byggir upp. Aðrastaðni tosar mann fyrst um loysing og so tjóðarbygging – ella nation building, sum tað nevnist á enskum - men í Føroyum er tað vent á høvdinum. Tað er blivið til symbolpolitikk burturav. Stavraðið er blivið ein óheppin partur av hesari symbolpolitisku tjóðarbyggingini, og tað er í hesum høpinum, at Málráðið hevur sæð tað sum sína uppgávu at fremja eitt serføroyskt stavrað.

Tá NÁM arbeiddi við atlassinum, gjørdi ein bólkur av geografum vart við og átalaði, at Málráðið, sum gav NÁM viðmæli um nøkur landanøvn, ikki helt §5 stk 2 í lógini um Málráðið um at virða og samstarva við yrkisbólkar. NÁM valdi einvíst í sambandi við útgávuna av atlassinum at fylgja leiðreglunum hjá forlagnum Harper Collins, sum illa gitni fjølmiðlamogulurin Rupert Murdoch eigur, heldur enn tilmælunum og reglunum hjá ST. Tað er ikki virðiligt fyri føroysku politisku skipanini, sum varðar av NÁM, og sum hevur fíggjað hetta ovurhonds dýra prestisjuprosjekt, at eftirlíka teimum í hesum og góðtaka eitt skert stavrað og eina bronglan av staðarnøvnunum hjá øðrum. Politikarar hava harvið valt at gera móti øðrum tað, sum vit ikki vilja onnur skulu gera mótvegis okkum og okkara staðarnøvnum.

UNGEGN (staðarnavnanevndin undir ST) mælir heimsins londum til, tá atlas verða gjørd, at virða tann mátan, sum ávísu londini ynskja, at onnur lond skulu kalla og stava teirra landa- og staðarnøvn. Við ekskluderandi stavraðnum ber hetta ikki til.

Tey lond, sum ikki hava eitt romanskt (latínskt) alfabet, mugu – við ískoyttum serstavum – fáa sær eitt sovorðið og skriva síni nøvn, sum tey halda tey eiga at verða skrivað við hesum. Og so hava onnur lond, sum ganga undir hesa ST-samtyktina, at virða hesa avgerð, hóast tey ikki hava C, Q, W, X ella Z.

Jógvan Mørkøre vísti soleiðis á, at Málráðið - við politiskari góðtøku – hevur sett Føroyar í eina óhepna og marghátttliga støðu, tí tá Føroyar taka loysing, verða vit noydd at fáa okkum eitt stavrað afturat. Í roynd og veru tað sama stavraðið, Málráðið júst hevur skert. Vit kunnu tá koma at standa við tveimum stavraðum. Tí stavraðnum, vit høvdu til fyri stuttum, og so tað amputeraða alfabetið, ið ein meiriluti í Málráðnum hevur gjøgnumtrumfað í heilaga navninum hjá tjóðarbyggingini.

So skuldu vit heldur varðveitt tað stavraðið, sum vit høvdu frammanundan, og bert havt tað eina. Tað hevði spart okkum fyri nógv stríð.

Spurdur, legði Jógvan Mørkøre afturat, at av tí at Atlassið ikki lýkur ST-treytirnar um landanøvn, kundi hann ikki – sum geografur og undirvísari - brúka Atlassið í undirvísingini. Sær vitandi var hetta støðan hjá flestu geografum. – Tær fáu síðurnar við føroyskum kortum, sum eru góðar, verða tiknar burturúr og brúktar.

Rolf Guttesen: Hugleiðingar um abc´ið og Atlassið.

Rolf Guttesen, geografur, tosaði um, at UNGEGN er hægsti autoritetur í verðini, tá tað snýr seg um, hvussu staðarnøvn skulu stavast, og hann undraðist á, hví NÁM ikki rættaði seg eftir tí. Tá hann í sínari tíð gjørdi Skúlabókagrunnin varan við at brúka tey nøvn og mátar at stava tey uppá, sum londini vilja at onnur skulu brúka, var svarið: "So leingi vit IKKI eru limir í ST, vilja vit ikki fylgja teirra prinsippum." Hetta helt Rolf Guttesen vera eina marghátttliga grundgeving, m.a. tá ein hugsar um, at Føroyar hava sítt egna umboð í UNGEGN, nevniliga Eivind Weyhe

At grundgeva fyri at Chile skal stavast KILI, tí ki sigur /tji/ á føroyskum er burturvið. Hvat so við Kina, Kiev og Kilimanjaro? Atlassið viðurkennur ikki bókstavin `c´, men beint undir Kili stendur býarnavnið Concepción, og har eru trý c í. Hvar er logikkurin?

Rolf Guttesen kom til endans eisini inn á gongdina, tá atlassið skuldi gerast. Upprunaliga varð bert talan um at gera nøkur føroysk kort. Í hesum sambandi er Rolf Guttesen blivin ákærdur fyri at hava bølt á málinum og ikki hava latið tilfar inn, men Rógvi Thomsen, sum var tilstaðar á fundinum, játtaði, at tilfarið er latið inn til NÁM.

Harafturat metti Rolf Guttesen, at NÁM tulkar leiðreglurnar hjá Harper Collins á sín egna máta.

Aftaná hesar fýra framløgurnar tók Randi Meitil samanum, og síðani var orðaskifti á skránni. Fundurin var liðugur kl 22:00

Vegna Málfelagið
Randi Meitil, skrivari